ALMANNAMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3, Postboks 208
110 Tórshavn

7. juni 2022
Mál: 22/10361
Tygara Skriv:
Viðgjørt: HP

Nr. 52-198/2021

Svar upp á § 52a fyrispurning nr. 52-198/2021 frá Erhardi Joensen, løgtingsmanni, settur landsstýrismanninum í almannamálum Sólvit E. Nolsø, um fólkapensjónistar í arbeiði

Spurningur:

Hvussu nógvir fólkapensjónistar ella fólk í aldrinum 69-72 ár, 73-75 ár og frá 76 árum og uppeftir, hava eina arbeiðsinntøku - býtt á kvinnur og menn, býtt á almenna og privata geiran, og býtt á øki í landinum?

Svar
Tað verður spurt eftir tal av fólkapensjonistum 69 ár og eldri, sum arbeiða. Landsstýrismaðurin skilir tað sum, at talan er um tey, sum eru 69 ár við ársbyrjan 2022. Tað merkir, at talan er um øll tey, sum hoyra til gomlu pensjónsskipanina. Upplýsingarnar niðanfyri fevna sostatt um tey, sum í minsta lagi eru fylt 69 ár ella eldri við ársbyrjan í 2022, og sum hava haft arbeiðsinntøku í 2022.

Tað er ikki ásett nakað minstamark fyri arbeiðsinntøku. Tað merkir, at eisini tey, sum hava heilt lítla arbeiðsinntøku eru tald við.

Fólkapensjonistar við lønarinntøku, skift á kyn og aldur

Kyn	69-72 ár	73-75 ár	76 ár og eldri	Í alt
Konufólk	340	125	87	552
Mannfólk	457	191	271	919
Íalt	**797**	**316**	**358**	**1.471**

Sum talvan omanfyri vísir, eru fleiri mannfólk enn konufólk í pensjónsaldri, ið hava lønarinntøku - eisini lutfalsliga. Í aldrinum 69 til 72 ár eru tað uml. 43% av monnunum, ið hava arbeiðsinntøku, meðan umleið 32% av kvinnunum hava arbeiðsinntøku. Av øllum fólkapensjonistum 69 ár og eldri hava 26% av monnunum arbeiðsinntøku og 14% av kvinnunum hava arbeiðsinntøku.

Fólkapensjonistar við arbeiðsinntøku, skift á aldur og øki

Øki	69-72 ár	73-75 ár	76 ár og eldri	Ialt	69+ ár við arb.innt
Suðurstreymoy	310	124	167	601	22%
Eysturoy	181	74	78	333	21%
Norðoyar	104	43	41	188	21%
Norðurstreymoy	61	23	37	121	20%
Suðuroy	75	24	14	113	13%
Vágar	39	19	14	72	15%
Sandoy	24	9	6	39	16%
Uttanfyri Føroyar	3		1	4	-
Ialt	**797**	**316**	**358**	**1.471**	

Lutfalsliga er lítil munur á, hvussu nógvir persónar 69 ár ella eldri, ið hava arbeiðsinntøku. Í Streymoy, Eysturoy og Norðoyggjum eru tað uml. 20 til 22%, ið hava arbeiðsinntøku, meðan tað Vágum, Sandoy og Suðuroy eru uml. 13 til 16% ið hava arbeiðsinntøku.

Fólkapensjonistar við arbeiðsinntøku, skift á ávikavist almenna ella privata løn

Alment/privat	69-72 ár	73-75 ár	76 ár og eldri	Ialt
Alment	419	145	110	674
Privat	378	171	248	797
Ialt	**797**	**316**	**358**	**1.471**

Samanlagt hava 54% av fólkapensjónistunum inntøku frá privata geiranum.

Almannamálaráðið, 7. juni 2022

Sólvit E. Nolsø
landsstýrismaður